# Ongin bygd í Føroyum so vakrar veðrar sum Porkeri

**Tað er fáa staðni í landinum, at so nógv verður gjørt burturúr seyðahaldi sum í Porkeri. Seyðasýningin við hugnakvøldi er krúnan á verkinum**

SEYÐAHALD
*Áki Bertholdsen*



*Her eru nakrir av teimum, sum standa fyri seyðasýninguum. Frá vinstru eru teir Sverri Schristiansen, sum er nevndarlimur fyri sýningina, síðani eru tað teir tríggir dómararnir, Petur Karl av Rana og Àsmundur Bærentsen av Tvøroyri, Eliesar Poulsen úr Hvalba og tann, sum heldur røðu er Óli í Hjøllum, sum eisini er nevndarlimur fyri seyðasýningunum*

**Porkeri:** Tað er ongin bygd í Føroyum, har tey hava so vakrar veðrar, sum í Porkeri.

Tað staðfesti Petur Karl av Rana, bóndi, undir einum borðhaldi í Porkeri herfyri.

Hetta var ikki eitt tilvildarligt borðhald. Hetta var borðhaldið, sum porkenningar halda í sambandi við seyðasýningar. Og Petur Karl av Rana var ein av dómarunum, sum hevði sýnað seyðin.

Og hann helt seg eisini hava nakað at hava pástandin í.

Hann segði, at hann hevur sýnað seyð í fleiri ár nú ymsastaðni. Harafturat var hann nevndarlimur í Jarðaraðnum i fýra ár og í tí sambandinum var hann at kalla í hvørjari einastu bygd í landinumn.

Og eftir øllum hesum royndum kundi hann staðfesta, at tey hava heilt fantanstiskar veðrar í landinum.

– Eg skal garenterað fyri, at ongin bygd í landinum hevur so vakrar veðrar sum Porkeri, segði Petur Karl av Rana.

Sostatt má eisini staðfestast, at porkenningar hava fingið løn fyri stríðið, tí tað er fáa staðni í landinum, at meiri verður gjørt burturúr seyðahaldi, sum júst í Porkeri.

Ikki minst hevur seyðurin verið fyri stórari framgongd tey seinastu árini.

Og tað er ikki minst seyðasýningunum fyri at takka.

Tað prógvaði Petur Karl av Rana við at siga, at tá ið seyðasýningarnar byrjaðu, varð ein 1. virðisløn latin. Men á seyðasýningini í heyst fekk meiri enn annarhvør veðrur 1. virðisløn. Hann segði eisini, at tað var ómetaliga trupult at sýna seyð nú á døgum, tí munurin er so lítil, at tað er næstan onki sum skilir ein seyð, sum fær virðisløn frá einum sum ikki fær tað og á seinastu sýningini tók tað teimum trimum dómarunum tveir tímar at semjast um, hvør skuldi hava virðislønir.

– Seyðasýningarnar hava havt sera stóran týdning fyri seyðin, tí bæði ull, bein og horn eru sum heild blivin nógv betri síðani sýningarnar byrjaðu, sigur Óli í Hjøllum, sum er ein av undangongumonnunum at hava seyðasýningar í Porkeri.

– Men tað vísir seg, at yvirhøvur fara steyp og virðislønir á somu hendur ár um ár, leggur hann afturat.



*Gudfinn Olsen og dótturin Gunnvá við vakrasta lambinum hetta árið. Hann hevði trý lomb og ein veðr á sýningini. Umframt lambið sum vann, fekk eitt lamb 2. virðisløn og eitt fekk onga. Veðurin fekk 2. virðisløn og var tann næstvakrasti á sýningini.*

### Sýning og hugnakvøld

Í Porkeri fóru tey at sýna seyð í 1994, men síðani er hon skipað betri og betri. Síðani 1997 eru steyp latin og síðani 1998 hava tey eisini gjørt eitt kvøld burtur sýningini við borðhaldi við mati og sangi.

Porkenningar hava eisini valt eina nevnd, sum skipar fyri sýningunum við einum limi úr hvørjum av teimum trimum høgunum í bygdini.

Í nevndini sita Óli í Hjøllum, Sverri Christiansen og Jógvan Midjord.

Og á sýningunum verða nógv steyp latin. Steyp verða latin til fimm teir bestu seyðunum í hvørjum bólki og bólkarnir eru tríggir í tali: Veturgamlir veðrar, hagalomb og so er eisini ein bólkur fyri bø- og fremmand lomb.

Tá ið tað er avgjørt, hvør skal hava virðislønir, verða tey vakrastu lombini og teir vakrastu veðrarnir so aftur valdir burturúr til at verða nummar 1,2,3,4 og 5.

Og steypini og virðislønir koma ymsastaðni frá, bæði frá Porkeris Kommunu, Litaval í Vági, Føroya Sparikassa, Føroya Bjór, Shellstøðini á Oyri í Vági, Føroya Banka, Breyðkassanum, Suðuroyar Sparikassa, MBM-Fóður, Timburhandlinum hjá Brynjálvi Christiansen í Vági. Harumframt høvdu hagarnir í Porkeri latið steyp og eisini kokkarnir, sum fyrireikaður hugnakvøldið høvdu latið steyp.

### Virðislønir

Tilsamans vóru 75 lomb og 20 veðrar við á sýningini, ella tilsamans 95 seyðir

Fjølmentastur var bólkurin fyri Traðar- og fremmand lomb. Í honum vóru 41 lomb. 22 av teimum fingu 1. virðisløn, 11 fingu 2. virðisløn og 7 fingu 3. virðisløn og bara eitt fekk onga virðisløn.

Í bólkinum fyri hagalomb vóru 34 lomb við á sýningini. Av teimum vórðu 12 prýdd við 1. virðisløn, 11 fingu 2. virðisløn, 9 fingu 3. virðisløn og bara tvey fingu onga virðisløn.

Teir veturgomlu veðrarnir vóru 20 í tali. 11 av teimum fingu 1. virðisløn, 5 fingu 2. virðisløn, 3 fingu 3 virðisløn og ein fekk onga virðisløn.

Annars fullu virðislønirnar soleiðis:



*Einsamøll konufólk ímillum nógv mannfólk. Jonhild í Hjøllum var einasta konufólk sum tók ímóti steypi. Her tekur hon ímóti virðisløn fyri eitt fremmant lamb, sum hon og maðurin, Óli, høvdu við á sýningini*



*Um kvøldið, tá ið seyðasýningin er liðug, verður boðið til búgvið borð í bygdarhúsinum Samxxxxx. Her sita tey spent og lurta eftir, hvør fær steyp*

**Hagalomb:** Nr. 1: Gudfinn Olsen, nr. 2: Zacharias Bech, nr. 3: Jákup Eli Bech, nr. 4: Dánjal Johannues Bech og nr. 5: Hans Eli Bech

**Traðar- og fremmand lomb:** Nr. 1: Heri Danielsen, nr. 2: Rógvi Berg, nr. 3: Óli í Hjøllum, nr. 4: Zacharias Bech og nr. 5: Óli í Hjøllum

**Veturgamlir veðrar:** Nr 1: Torleif Bech, nr. 2: Gudfinn Olsen, nr. 3:Juul Sumberg, nr. 4: Fríðálvur Múller og nr. 5: Sverri Christiansen



*71 ára gamli Torleif Bech var aldursforeti ímillum steypavinnarnarnar. Hann átti vakrasta veðrin og tað fekk hann bæði ognarsteyp og ferðasteyp afturfyri*



*Jógvan Midjord, sum er nevndarlimur fyri seyðasýningini, setir sín serliga dám á borðhaldið við harmonikuni*